Føroyska framløgan var sera litrík, bombastisk og sera málrættað sigur Martin Breum. Her Hákun Djurhuus, Aksel Johannesen og Sjúrður Skaale. Mynd Jan Müller

# Danskur journalistur um føroyska Arktis-framløgu: Skilagott stig fyri Føroyar

**Jan Müller**

24.10.2015 - 16:23

Oljan.fo

Arctic Circle. Millum tey mongu, sum lýddu á, meðan Aksel Johannesen, løgmaður, Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður og Hákun Djurhuus, SEV-stjóri høvdu framløgur á Arctic Circle í Reykjavík herfyri, var eisini kendi danski journalisturin Martin Breum, sum man vera tann í Danmark, ið hevur brúkt mest orku uppá arktiskar spurningar. Eftir framløgurnar spurdi oljan.fo hann um, hvat hann helt um hetta burturav føroyska innslagið á ráðstevnuni.

“Eg haldi, at føroyska framløgan var sera litrík og bombastisk og sera málrættað. Tað var týðiligt, at her var talan um eitt landsstýri ella eitt føroyskt initiativ, har man hevði sett sær fyri at marknaðarføra Føroyar sum eitt “pitstop” fyri framtíðar ferðsluna í tí arktiska havøkinum. Og tað varð gjørt “sindsygt godt”, sum hann málber seg.

“Tað var sera sannførandi og var strategiskt sera væl gjøgnumarbeitt, og eg ivist ikki í, at tað hevur havt ávirkan.

Um tú ynskir at gera Føroyar til eina tangastøð fyri ta arktisku skipaferðsluna, so var hetta eitt sera skilagott stig.”

Uppá fyrispurning um í hvønn mun hann heldur Føroyar hoyra til Arktis, sigur Martin Breum, at tað hevur hann onga meining um og vísir á, at tað finnast einar seks-sjey ymsar defininitiónir av, hvat Arktis er.

“Og eg haldi fyri vist, at Føroyar koma inn undir í hvussu er eina av teimum, og tað er so tann Føroyar hava valt at halda seg til, og tað skilji eg væl.”




Martin Breum við síðuna av íslendska forsetanum til føroyska framløgu á Arctic Circle. Mynd Jan Müller

